# Nú mugu Karsten og Signar semjast

*– Arbeiðssteðgurin hjá lærarunum er ein politiskur spurningur, sigur formaðurin í Skúlaráðnum í Havn*



*Týsdagin hevði Skúlaráðið í Havn fund í býráðssalinum um støðuna í fólkaskúlanum, nú teir sáttmálasettu lærararnir hava lagt arbeiðið niður. Frá vinstru eru tey Lissy Hansen, sum er varalimur hjá Svenningi av lofti úr Miðflokkinum, Síðani situr Johan Samuelsen, sum umboðar Javnaðarflokkin, Jákup Simonsen er skrivari, fólkafloksmaðurin, Egon Øregaard, er formaður og ytst høgrumegin situr Hildur Patursson, sum umboðar Tjóðveldisflokkin*

ÁKI BERTHOLDSEN

–Vit heita á partarnar í ósemjuni í fólkaskúlanum um at fara undir samráðingar sum skjótast.

Nú er eisini Skúlaráðið í Havn farið at gera vart við seg um standin í fólkaskúlanum, eftir at teir sáttmálasettu lærararnir løgdu arbeiðið niður mitt í farnu viku.

Týsdagin hevði Skúlaráðið í Havn, sum umboðar ein góðan triðing av føroysku skúlabørnunum og foreldur teirra, fund um støðuna, sum hevur tikið seg upp, aftaná at lærararnir løgdu arbeiðið niður.

Niðurstøðan á fundinum var, at ráðið samdust um at senda Lærarafelagnum, Signari á Brúnni, landsstýrismanni í skúlamálum og Karsten Hansen, landsstýrismanni í fíggjarmálum eina áheitan.

–Sum umboð fyri foreldrini heita vit á partarnar í ósemjuni í fólkaskúlanum um at fara undir sáttmálasamráðingar sum skjótast og at finna eina virðiliga loysn á hesum máli, so at tann kravda undirvísingarskyldan hjá næmingunum verður vird og at næmingarnir fáa teir undirvísingartímar, sum teir eiga eftir lógini.

Í áheitanini minnir Skúlaráðið eisini til viðmerkingarnar, sum tað hevði, tá ið hendan nýggja fólkaskúlalógin varð til viðgerðar.

– Vit vóna, at myndugleikarnir liva upp til sína skyldu á skúlaøkinum og megna at fylla lógarkarmarnar út, so sum ætlanin er við nýggju fólkaskúlalógini.

Skúlaráðið sigur, at tað tekur málið í størsta álvara og at tað vónar eina skjóta og góða loysn.

### Ein politiskur spurningur

Egon Øregaard, formaður í Skúlaráðnum í Havn, vísir á, at ráðið hevur ikki myndugleika til at gera nakað sum helst. Og tískil fær Skúlaráðið heldur onki gjørt, uttan at vísa á, hvussu óheppin støðan er.

Hann vísir eisini á, hetta er ein spldurnýggj støða, tí hetta er fyrstu fer, at lærarar leggja arbeiðið niður.

– Tí er tað eitt sindur trupult at vita, hvussu farast skal fram.

Men hann leggur dent á, at Skúlaráðið vil ikki leggja seg út í samráðingarnar sum so og tað vil tí heldur ikki fara í parti við øðrum partinum ímóti hinum partinum.

Og tí hevur Skúlaráðið heldur onga meining um, hvør av pørtunum hevur skyldu at taka stig til at taka samráðingarnar uppaftur.

Sjálvur heldur hann, at ósemjan í fólkaskúlanum er ein politiskur spurningur.

– Eg haldi, at fyrsta treytin fyri, at koma víðari, er, at Karsten Hansen, landsstýrismaður í fíggjarmálum og Signar á Brúnni, landsstýrismaður í skúlamálum semjast um, hvat hendan nýggja fólkaskúlalógin ber í sær.

Hann heldur, at trupulleikin liggur í, at politikararnir hava samtykt eina nýggja fólkaskúlalóg. Men samstundis hava teir ikki verið til reiðar at seta tann peningin av, sum er neyðugur til at seta lógina í verk.

Egon Øregaard vísir á, at, Skúlaráðið hevur alla tíðina, vita at tað fór at fáa fíggjarligar avleiðingar at seta nýggju fólkaskúlalógina í verk og tað vísti Ráðið eisini á, tá ið lógin var til viðgerðar.

– Tí havi eg ilt við at síggja, hvussu vit kunnu koma víðari, fyrrrenn Signar á Brúnni og Karsten Hansen eru blivnir samdir um, hvat tann nýggja lógin ber í sær. Og fyrrenn teir báðir eru blivnir samdir, fær fíggjarmálastýrið sum so onki gjørt.

– Tí er hetta fyrst og fremst ein politiskur spurningur.

Men við hesum hevur hann tó ikki sagt, at løgtingið eigur at leggja upp í og at enda arbeiðssteðgin við lóg.

Og hann leggur enn einaferð dent á, at hetta er hansara egnu sjónarmið, tí hetta eru spurningar, sum Skúlaráðið ikki hevur viðgjørt.

# Allan og Rúni bíða framvegis

*–Tað verður ikki løtuverk at fáa semju ílag ímillum lærararnar og fíggjarmálastýrið, heldur Allan Skaalum, semingsmaður*

ÁKI BERTHOLDSEN



*Tað kom eitt sindur óvart á Allan Skaalum, semingsmann, at báðir partar skuldu vraka semingsuppskotið*

– Enn eru ongar ábendingar yvirhøvur um, at partarnir eru til reiðar at taka samráðingarnar uppaftur.

– Og fyrrenn vit fáa eina beinleiðis áheitan, fáa vit onki gjørt.

Enn sita teir báðir, sum skuldi royna at finna semju í trætuni ímillum Lærarafelagið og fíggjarmálastýrið bara og bíða.

Síðani samráðingarnar slitnaðu, hava teir báðir semingsmenninir, Allan Skaalum og Rúni Heinesen, ikki gjørt nakrar royndir at fáa lærararnar og fíggjarmálastýrið til samráðingarborðið.

– Vit kunnu ikki taka semingsroyndirnar uppaftur, fyrrenn partarnir beinleiðis heita á okkum um at gera tað, sigur Allan Skaalum.

Hann sigur, at teir eru ikki semingsmenn hjá semingsstovninum og tí kunnu teir ikki taka arbeiðið uppaftur, fyrrenn teir fáa eina beinleiðis áheitan.

– Vit kunnu ikki fara til arbeiðis, uttan at arbeiðsgevarin, Lærarafelagið og fíggjarmálastýrið biðja okkum um tað, sigur hann.

Men hann leggur afturat, at sum støðan er í løtuni, er onki, sum bendir á, at boð verður eftir teimum í bræði.

– Partarnir standa rættiliga langt frá hvørjum øðrum.

– Øðrumegin stendur fíggjarmálastýrið við einum aðalmáli um ikki at víkja frá einum ávísum fíggjarligum karmi.

– Og hinumegin standa so lærararnir við einum aðalmáli um, at nýggja fólkaskúlalógin áleggur teimum eitt stórt, eyka arbeiði, sum teir mugu fáa tíð til at gera.

Tí mugu fleiri lærarar setast. Og tað kostar pening útyvir teir karmar, sum fíggjarmálastýrið arbeiðir innanfyri.

Og Allan Skaalum heldur, at fyribils tykist tað ikki, sum um partarnir hava nakað sum helst at tosa um.

Men hann viðgongur, at tað kom eitt sindur óvart á hann, at báðir partar skuldu vraka semingsuppskotið.

– Vit hildu okkum hava funnið eina millumloysn, sum gav báðum pørtum eitt sindur í part.

Somuleiðis settu vit í semjuna nakrar grundgevingar fyri, hví hesar samráðingarnar eru heilt serligar og ikki kunnu samanberast við aðrar samráðingar, sum hava verið á arbeiðsmarknaðinum.

– Uppá ein máta, raktu vit eina javnvág. Men hendan javnvágin vísti seg tíverri at vera undir vatnskorpuni, sigur semingsmaðurin.

Hann heldur, at sum støðan er, verður tað ikki løtuverk at fáa semju ímillum partarnar, so enn eru ongi útlit fyri, at læraranir fara aftur til arbeiðis.

– Hóast semingsroyndirnar skuldu byrja skjótt aftur, hevði tað helst tikið fleiri dagar at komu til eina semju, heldur hann

Annar semingsmaðurin í Semingsstovninum, John Rajani væntar ikki, at semingsroyndirnar høvdu verið øðrvísi um tað var stovnurin, sum stóð fyri teimum.

– Aðrir semingsmenn arbeiða ofta eftir lógini, hóast teir ikki formliga eru bundnir at henni, eins og semingsstovnurin er.

– Semingsstovnurin kann útseta eitt verkfall eina viku, men aftaná tað, kunnu partarnir leggja arbeiðið niður, nær tað skal vera. Og er ongin møguleiki fyri semju, so er onki at gera.

– John Rajani sigur, tó at semingsmenninir kunnu taka semingsroyndirnar uppaftur, uttan beinleiðis at vera bidnir um tað.

– Tað kann vera eftir eini ábending í fjølmiðlunum, ella tí at aðrar ábendingar gera, at semingsmenninir halda, at tað er vert at royna aftur, sigur hann.



# – Hatta er fjas

*Soleiðis sigur Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, til tað, sum forkvinnan í Føroya Lærarafelag hevur ført fram um, at Fíggjarmálastýrið eigur næsta leik í ósemjuni teirra millum. Hann vísir á, at tað var Lærarafelagið, ið boðaði frá verkfalli*



*Tað eru ikki vit, sum eru farin í verkfall, men vit eru framvegis til arbeiðis, sigur Karsten Hansen, fíggjarmálaráðharri, sum ikki skilir, at Føroya Lærarafelag metir, at Fíggjarmálastýrið eigur næsta leik í ósemjuni millum partarnar*

DAGFINN OLSEN

Arbeiðssteðgurin hjá sáttmálasettu lærarunum hevur nú staðið við í meira enn eina viku og einki samband hevur verið millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið, síðani 7. mars.

Fíggjarmálaráðharrin Karsten Hansen metir, at tað er av allari leið, tá forkvinnan í Føroya Lærarafelag, Elsa Birgitta Petersen, førir fram, at bólturin liggur hjá Fíggjarmálastýrinum í ósemjuni millum Føroya Lærararfelag og Fíggjarmálastýrið.

### Fjas

– Tað er fjas, at bólturin liggur hjá okkum. Lærarafelagið boðaði frá verkfalli og segði við semingsmenninar, at vit fara í verkfall á miðnátt (týskvøld 7. mars, blðm.).Semingsmenninir eftirlýstu, um teir skuldu halda fram og royna semju og tað vóru vit til reiðar til, men Lærarafelagið segði nei. Elsa Birgitta Petersen takkaði semingsmonnunum fyri gott arbeiði, men gjørdi greitt, at brúk var ikki meira fyri teimum. At siga, at vit hava bóltin, tað skilji eg ikki. Tað eru ikki vit, sum eru farin í verkfall, men vit eru framvegis til arbeiðis, sigur Karsten Hansen.

*Vil tað so siga, at talan er ikki um arbeiðssteðg, men um verkfall?*

– Tey hava fráboðað verkfall. Vit hava ikki fráboðað verkbann, sigur Karsten Hansen.

Karsten Hansen sigur, at í Fíggjarmálastýrinum verður arbeitt víðari við málinum.

– Men kostnaðin kunnu vit ikki ganga við til. Tað ber ikki til og tað veit felagið eisini av, men vit eru altíð til reiðar at samráðast, sigur Karsten Hansen.

– Nú er verkfall og vit kenna sjálvsagt okkara ábyrgd og royna at finna eina loysn, vísir Karsten Hansen á.

### Tílmatalið

*Tað er arbeiðstíðin, ið skilir partarnar?*

- Ja. Nú sigur forkvinnan í Lærarafelagnum, at trupulleikin er ikki viðvíkjandi lønini, men við semingsmenninar segði hon, at hon var ikki nøgd viðvíkjandi lønini, vísir Karsten Hansen á.

Hann viðgongur tó, at stóra ósemjan er um niðursetta undirvísingartímatalið.

– Tað kann dokumenterast, at í løtuni er bara Svøríki, ið hevur lægri tímatal. Hini londini liggja omanfyri, sigur Karsten Hansen, sum veit, at Føroya Lærarafelag hevur víst hesum aftur, men hann sigur seg ikki vita, hvar tey tølini stava frá, tí Fíggjarmálastýrið hevur síni tøl frá myndugleikunum í okkara grannalondum, sum umsita hetta.

### Játtan fylgir ikki við

*Er hetta mál dømi um, at peningajáttan fylgir ikki við lógunum, sum ført hevur verið fram?*

– Tað hava vit so mong dømi um. Tað er ofta, at lóg verður smíðað, men peningur kemur ikki eftir einum ári. Hetta er einki eindømi, sigur Karsten Hansen, ið kann nevna fleiri dømi um hetta, men hann vísir samstundis á, at fólk fara ikki til hús av hesi orsøk

### Ikki ósemja millum partamenn

Karsten Hansen vísir eisini aftur prátinum um, at tvídráttur er millum partamenninar Signar á Brúnni og Karsten Hansen, ið umsita ávíkavist skúlamál og fíggjarmál.

– Tað er eingin tvídráttur okkara millum, hóast vit kanska síggja málini frá ymsum síðum, men tað hevur sínar náttúrligu orsøkir. Men tá ástendur, so vita vit hvar ábyrgdarbýtið er, sigur Karsten Hansen.

### Kann taka langa tíð

*Hevur fíggjarmálaráðharrin nakað boð uppá, hvussu longi íkomna støðan við arbeiðssteðgi kann vara?*

– Nei, tað havi eg ikki, men forkvinnan í Føroya Lærarafelag hevur sagt fleiri ferðir, at tað verður longi, sigur Karsten Hansen.

Karsten Hansen sigur seg ikki hava umhugsað møguleikan, sum Føroya Lærarafelag nevnir í Sosialinum í gjar, um at lærarar, ið eru tænastumenn, kunnu koma fyri tingið og lønin har verður ásett við lóg.

– Tað er sjálvsagt ein møguleiki, men í mínari verð eru samráðingar nú einaferð samráðingar millum tveir partar. Lat okkum halda okkum til tað, sigur Kartsen Hansen.

*Hvussu longi kann slík støða halda fram. Hevur samfelagið ráð. Tað kann jú hugsast, at foreldur fara ikki til arbeiðis, tí børnini eru ikki í skúla?*

- Eg veit ikki reiðiliga. Støðan er sjálvsagt óheppin fyri børn og foreldur, men tað er undirvísingarskylda og tað hava vit eitt stýrið at taka sær av sigur Karsten Hansen, sum í dag er ímillum teirra, sum fer til Danmarkar at samráðast við danir um framtíðarstøðu Føroya í ríkisfelagsskapinum.

Men hann ger vart við, at hann er aftur longu í vikuskiftinum og at fólk í Fíggjarmálastýrinum taka sær av málinum millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið.

Men skal Karsten Hansen gera eina langa søgu stutta, so er niðurstøðan, at bólturin liggur ikki hjá Fíggjarmálastýrinum.



*Frá samráðingum.*
*– Tey hava fráboðað verkfall. Vit hava ikki fráboðað verkbann, sigur Karsten Hansen.*

## Fakta



*Óivað eru fleiri, ið ikki heilt hava fingið eina heildarmynd av, hvat tvídrátturin millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið snýr seg um Her er í stuttum tað, ið Lærarafelagið hevur ført fram við samráðingarborðið*

### Krøv Føroya Lærarafelags

***Niðanfyristandandi hoyrir við til ta generellu lønarhækkingina***

Generell lønarhækking 6,5%

Ískoytiseftirløn til allar eftirløntar limir felagsins.

Nakrar umflokkingar, sum ikki komu við í seinastu semju.

Dagføring av ferðaendurgjaldi hjá lærugreinaráðgevum o.ø.

Reglugerð fyri nýggja álitisfólkaskipan sambært nýggju fólkaskúlalógina.

Nýggj semja um arbeiðs- og lønarviðurskiftir hjá limum felagsins á Sernámsdeplinum skal staðfestast.

Viðmerkingar til setanarsáttmálan frá 1998 skulu staðfestast

Næmingatalið í øllum flokkum í fólkaskúlanum skal ikki fara upp um 24.

***Av tí at niðanfyristandandi er nýtt arbeiði, sum er álagt lærarum við lóg, krevur Føroya Lærarafelag, at hetta skal haldast uttan fyri ta generellu lønarhækkingina***

Í punkt 5 í semju millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið frá 31. okt. 1999 stendur, at samráðingarnar skulu verða um broyttar og meira álagdar uppgávur sambært nýggju fólkaskúlalógini. Hetta eru okkara krøv.
Víst verður til tær greinirnar í nýggju fólkaskúlalógini, sum áleggja lærarum økta arbeiði.

1. Tíð til felags ráðlegging, felags fyrireikina og felags eftirmeting sambært § 14.
2. Tímaniðurskurð fyri økta umsiting og leiðslu sambært § 21 og § 55
3. Tímaniðurskurður fyri økta flokslæraraarbeiði sambært § 21
4. Dagføring av tímanýtslu í námsfrøðiliga tænastudeplinum/skúlabókasavninum sambært § 23
5. Skipan fyri skúlavegleiðarar
6. Skipan fyri telduvørar
7. Skipan fyri savnsrøkt og røkt av serstovum.
8. Eftirútbúgvingin av fólkaskúlalærarum eigur at víðkast.

*Kelda: Føroya Lærarafelag*